# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ragnhild Hansen 80 ár



Í gjár, týsdagin 19. juni, fylti Ragnhild Hansen í Klaksvík 80 ár. Ragnhild er ættað úr Heimistovu í Svínoy. Foreldrini vóru Anna og Jóannes Joensen. Tey áttu sjey børn – tríggjar dreingir og fýra gentur. Ragnhild er elst av systrunum.

Í 1949 giftist Ragnhild Karsteni Hansen, sum var ættaður uttan av Toftum, og sum vaks upp í Svínoy. Tey fluttu í 1950 úr Svínoy og til Klaksvíkar, har tey bygdu á Gerðareiði.

Ragnhild var, sum mest sum allar konur tá í tíðini, heima hjá børnunum, meðan tey vóru smá og vuksu til. Í býlinginum á Gerðareiði, sum fyri tað mesta varð bygdur fyrstu árini eftir kríggið, vóru ógvuliga nógv børn í fimmti og seksti árunum.

Børnini hjá Ragnhild og Karsten eru Hanus (1949), Jóannes (1955) og Finngerð (1961). Hanus og Finngerð búgva í Klaksvík, og Jóannes býr á Toftum. Ragnhild eigur átta ommubørn, og tað eru komin seks í næsta ættarliðnum.

Heimið í Kráargøta hevur altíð verið hugnaligt og friðfult í góðum grannalagi, og gestablídnið hevur verið stórt. Tað var stórur smeitur fyri Ragnhild, tá ið hon í 2001 misti mannin.

Hóast heilsan ikki nú er, sum hon hevur verið, so fylgir Ragnhild framvegis væl við í tí, sum gongur fyri seg. Í familjuni er hon náturligi miðdepulin. Hon hevur umvegis telefonina samband við nógv fólk, hon er fegin um heimahjálpirnar, sum vitja tvær ferðir um dagin, hon fegnast um tey, sum trúliga støkka inn á gólvið, og hon fylgir væl við í bløðunum, útvarpinum og sjónvarpinum.

Dótturin er inni á gólvinum hjá Ragnhild mest sum hvønn dag. Í gjár varð føðingardagurin hildin í heiminum hjá dóttrini, og har vóru næstan hálvt annað hundrað fólk inni á gólvinum og heilsaðu upp á Ragnhild.

J

## Andlát og jarðarferðir

**Kaj Lykke Jensen**, búsitandi í Ålborg, andaðist 15.juni 65 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin 21.juni kl. 13 úr Vejgaard Kirke.

**William Holm Jacobsen, Tórshavn**, fer til gravar úr Ebenezer hósdagin 21. juni, kl. 13.

**Jógvan Petersen**, ættaður úr Haldarsvík, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 17. juni, 64 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá í elskaði maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og bróður okkar

**Árni Johansen**
Tórshavn

andaðist og var jarðaður.
Tøkk til Hera Joensen, prest, fyri vøkur og troystarfull orð í kapellinum og í Vesturkirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og tykkum, ið hjálpti til við ervinum.
Tøkk fyri heilsanir, vitjanir, blómur og kransar.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Solveig, Randi og Áki**

## Ransin fekk silvurmedalju



*Ransin Napoleon Djurhuus fekk bronsumedalju, tá hann gjørdi sítt sveinastykki á Tekniska Skúlanum í Gladsaxe. Hann er í læru sum bygningsmálari hjá málarafyritøkuni Falkenberg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er ikki einans í ítróttinum at medaljur verða látnar. Ransin Napoleon Djurhuus í Havn, sum eru í læru sum bygningsmálari hjá málarafyritøkuni Falkenberg, fekk karakterin 10,0 og bronsumedalju tá hann gjørdi sítt sveinastykki á Tekniska Skúlanum í Gladsaxe í døgunum 4. til 13. juni 2007.

Uppgávan hjá honum var m.a. at blanda ymiskar litir og at mála ein bás við hurðum og vindeygum. Hetta arbeiði var so væl úr hondum greitt, at hann fekk bronsumedalju, sum bert verður givið fyri sera gott avrik.

Silvurmedalja verður eisini latin, men tað eru bert tveir málarar, sum hava fingið silvur síðan 1989.

Ransin skal møta á ráðhúsinum í Keypmannahavn seinni í summar, tá hann verður heiðraður av drotningini.

**Dagurin**

**21. juni. Longsti dagur.** Sólstøður, tá ið sólin stendur hægst á luftini um miðdagin. Kann vera 21. ella 22. juni. Dagurin eitur eisini Albanus. Hann var úr Onglandi, og gjørdist biskupur í Mainz, har hann varð hálshøgdur, tá ið vandalar um ár 400 søktu at býnum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin